# ítróttur

Nr. 113 • hósdagur • 17. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


## Dystir hósdagin

17.00 Ongland-Sveis
19.45 Kroatia-Frakland

# Kekkia á pínubeinkinum

**Ikki fyrr enn í seinasta góða korterinum eydnaðist tað kekkum at venda hóttandi tapinum til væntaða sigurin á Letlandi**

BÓLKUR D
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá táverandi Kekkoslovakia í 1976 vann EM-kappingina, var hetta ein av teimum heilt stóru sensatiónunum í heimsfótbólti. Tað bragdið livir enn í minninum hjá alheims fótbóltsserfrøðingum, men týsdagin var um reppið, at núverandi Kekkia sjálvt varð offur fyri eini sensatión.

At Letland yvirhøvur hevði strítt seg fram til EM-endaspælið var ein rimmar sensatión, og flestu serfrøðingar mundu vera á einum máli um, at leikararnir úr baltiska landinum skuldu vera fegnir, bara fyri at vera í Portugal. Stig skuldu teir so í øllum førum ikki rokna við.



*Verpakovskis fær her bóltin tætt undir kekkiska málinum, og løtu seinni er støðan púra óvæntað 1-0 til Letland. Kekkia fekk tó í evstu løtu vent dystinum, so sensatiónin varð av ongum á hesum sinni*

*Mynd: Reuters*

### Grikskur íblástur

Letlendski venjarin, Aleksandrs Starkovs, helt tó undan dystinum, at hansara lið ikki var heilt uttan møguleikar. Ikki minst tóktist hann halda nógv av grikska avrikinum móti Portugal, og so segði hann, at kanska kundi Letland sýna eins gott verjuspæl.

Og tað var í øllum førum júst hetta, sum teir royndu. Hóast tað var Kekkia, sum hevði bóltin mest, og hóast tað vóru teir, sum trýstu, so skaptu teir ikki teir heilt nógvu møguleikarnar.

Ætlanin hjá Letlandi var sum so greið. Teir royndu at yvirfólka defensiva miðvøllin, soleiðis at kekkiska kombinatiónsspælið ikki fekk pláss at virka á, og síðani varð satsa upp á kontrabóltar til teir báðar álopsleikararnar, sum lógu sera avskornir frá restini av liðnum.

Og beint fyri steðgin gav hetta úrslit. Prohorenkovs fekk fatur á einum langum neyðsparki úr verjuni, og tá hann smekkaði innfyri, kundi Verpakovskis úr stuttari fjarstøðu stýra bóltinum í kassan.

Seinna umfarið vóru ta sum vera man nakrir skelkaðir kekkar, sum komu á vøllin, men teir fingu tó skjótt lagt stórt trýst á mótstøðuna. Leingi tóktist Letland tó standa ímóti trýstinum, men við 17 minuttum eftir kom fyrra forloysingin hjá Kekkia. Lettiski málverjin fekk ikki nevað eitt innlegg frá Poborsky burtur, og so kundi Milan Barros senda í kassan til javnleik.

Og talan var aftur um mistak, tá Kekkia fimm minuttir fyri tíð skeyt sigursmálið. Eftir at málverjin ikki hevði fingið fatur á einum longum bólti, eydnaðist heldur ikki verjuni at sparka burtur, og so kundi Mareki Heintz senda í manntóma málið. Altso trý stig til Kekkia, men Letland fekk so undir øllum umstøðum víst, at teir ikki bara eru komnir til Portugal fyri at fáa bank.

### Ruud bjargaði Hollandi

Seinni dysturin týskvøldið var millum Holland og Týskland, sum samstundis vóru seinastu liðini at fara ígongd við endaspælið.

Her var rættiliga lagt upp til stórdyst, men spælið í dystinum boðaði so als ikki frá hesum. Holland hevði kanska bóltin meira fyrstu longu løtuna, men eins og í dystinum móti Føroyum, so megnaðu teir í alt ov lítlan mun at fáa ferð á spælið, og tí høvdu týskarar ikki stórvegis trupulleikar av hesum.

Og hóast teir ikki høvdu teir heilt nógvu opnu málmøguleikarnar, so lógu týskarar ofta framvið í deyðbóltsstøðum, har hollendska verjan tóktist hava ovurstórar trupulleikar.

Og júst eftir ein slíkan kom Týskland eisini á odda. Thorsten Frings sendi innskrúvandi fríspark innfyri úr høgru, og tá hvørki verju- ella álopsleikarar fingu nortið við bóltin, smoygdi hann sær yvir á handara stólpan, haðani hann støkk í málið.

Og so kundi týskarar spæla júst soleiðis, sum teir høvdu hugsað sær. Disciplineraðir í verjupartinum fyri síðani at royna kontraspælið, og heilt leingi tóktist tað mest sum vónleyst hjá Hollandi at vinna seg aftur í dystin.

Um miðjan seinna hálvleiki fekk Holland tó strítt seg til eitt veruligt yvirtak, og níggju minuttir fyri leiklok fingu teir so løn fyri stríðið. Talan var um eina framúr góða roynd frá van Nistelrooy, sum sera kroystur onkursvegna fekk snarað bóltinum í kassan, hóast hetta sá mest sum ógjørligt út.

Og fyri hollendingar man tað vera stórur munur á, at teir hóast alt fingu eitt stig burtur úr dystinum. Eitt tap vildi í øllum førum pískað teir til at vinna báðar eftirverandi dystirnar.

Og eisini týskarar kunnu væl liva við hesum. Sjálvandi vildi tað verið ein fyrimunur, um teir her høvdu ognað sær trý stig, men ein tann størsti sannleikin í einum endaspæli man vera, at fyrsti dysturin ikki skal tapast, og hetta livdu so bæði Týskland og Holland upp til týskvøldið.

**Kekkia-Letland 2-1 (0-1)**
0-1: Maris Verpakovskis, 45
1-1: Milan Baros, 73
2-1: Marek Heinz, 85

**Týskland-Holland 1-1 (1-0)**
1-0: Thorsten Frings, 30
1-1: Ruud van Nistelrooy, 81



# Aftur Sam

**Triðju ferð upp í slag eydnaðist Sam Vang at vinna Grand-Prix renning**

Millum tiltøkini á eystanstevnu var sum vant eisini runnið um kapp, og var kappingin partur av samlaðu Grand-Prix kappingini. Her hevði Sam Vang undan kappingini lagt seg á odda við 80 stigum fyri tvær renningar, og aftur hesa ferð megnaði hann at fáa fult.

Talan var um ein harðan spurt móti Jonhardi Larsen, og aftur hesaferð vísti tað seg, at Sam í løtuni er stinnasti rennarin í landnum.

Úrslitini av kappingini framganga annars av yvirlitinum niðanfyri.

**-jm**

## Úrslit, eystanstevnurenningin

**Gentur -7 f. 97- (1/2 km)**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 2 | 26 | Elisabet | Vang | 1998 | Hoyvík |
| 2 | 2 | 29 | Bjørt | Olafsdóttir | 1998 | Bragdið |
| 3 | 2 | 39 | Kristina | Østerø Knudsen | 1998 | Tórshavn |
| 4 | 2 | 41 | Paulina | Fuglø | 1999 | Norðdepil |
| 5 | 2 | 45 | Silje | Krarup | 1998 | Tórshavn |
| 6 | 3 | 15 | Miriam | Bethuelsdóttir | 1999 | Treysti |

**Dreingir -7 f. 97- (1/2 km)**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 1 | 58 | Betuel | Hansen | 1997 | Roysnið |
| 2 | 1 | 58 | Steingrímur | Hallsson | 1997 | Bragdið |
| 3 | 1 | 59 | Beinir | Johannesen | 1997 | Treysti |
| 4 | 2 | 7 | Høgni | Egilstoft Nielsen | 1997 | Frælsi |
| 5 | 2 | 20 | Sonni | Højgaard | 1997 | Saltangará |
| 6 | 2 | 22 | Niklas | Højgaard | 1998 | Saltnes |
| 7 | 2 | 32 | Bjarki Kass | Olsen | 1997 | Roysnið |
| 8 | 2 | 33 | Jákup | Hansen | 1998 | Toftir |
| 9 | 2 | 35 | Jónas | Frederiksberg Berthelsen | 1998 | Strendur |
| 10 | 2 | 37 | Magni | Weihe | 1998 | Frælsi |
| 11 | 2 | 38 | Torkil Sørin | Jógvansson | 1999 | Nólsoy |
| 12 | 2 | 39 | Betuel R. | Hansen | 1997 | Roysnið |
| 13 | 2 | 42 | Niels Jákup | Poulsen | 1999 | Tórshavn |
| 14 | 2 | 49 | Beinir | Langgaard | 1999 | Roysnið |
| 15 | 2 | 53 | Petur | í Túni Petersen | 1999 | Saltnes |
| 16 | 3 | 5 | Villads | Krarup | 2000 | Tórshavn |

**Gentur -10 f. 94-96 (1/2 km)**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | | Guðrið | Eystberg | 1994 | Tórshavn |
| 2 | | | Astrið | Foldarskarð | 1994 | Rituvík |
| 3 | | | Jórunn | Hansen | 1995 | Roysnið |
| 4 | | | Sissal | Skaale | 1994 | Bragdið |
| 5 | | | Bjørk | Reynagarð Svabo | 1996 | Frælsi |
| 6 | | | Birita | Debes | 1995 | Rituvík |
| 7 | | | Durita | Skoradal | 1996 | Roysnið |
| 8 | | | Gunvá | Justinussen | 1994 | Roysnið |
| 9 | | | Anna Malan | Jógvansdóttir | 1995 | Nólsoy |
| 10 | | | Ingibjørg | Petersen | 1995 | Bragdið |
| 11 | | | Jóhanna | Petersen | 1996 | Saltnes |
| 12 | | | Maria | Joensen | 1995 | Bragdið |
| 13 | | | Milja | Skaale | 1996 | Bragdið |
| 14 | | | Emilja Sonne | Djurhuus | 1996 | Saltangará |
| 15 | | | Leila | Hansen | 1995 | Nólsoy |
| 16 | | | Elin Dahl | Hansen | 1996 | Roysnið |
| 17 | | | Annika Frida | Wardum | 1996 | Streymnes |

Vegna tekniskt brek eru tíðirnar ikki tøkar

**Dreingir -10 f. 94-96 (1/2 km)**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 1 | 38 | Rúni | Seloy | 1994 | Bragdið |
| 2 | 1 | 40 | Albert Róin | Johannessen | 1995 | Roysnið |
| 3 | 1 | 42 | John Viljam | Johannesen | 1995 | Treysti |
| 4 | 1 | 45 | Regin | Joensen | 1995 | Bragdið |
| 5 | 1 | 50 | Haraldur | Højgaard | 1995 | Saltnes |
| 6 | 1 | 53 | Dánial Jákup | Johannesen | 1994 | Toftir |
| 7 | 1 | 54 | Hákun | Edmundsson | 1996 | Toftir |
| 8 | 1 | 56 | Jóhannus | Hansen | 1996 | Toftir |
| 9 | 1 | 57 | Ólavur | Joensen | 1996 | Bragdið |
| 10 | 1 | 58 | Einar | Gregersen | 1995 | Treysti |
| 11 | 2 | 0 | Osvald | á Marknagili | 1996 | Treysti |
| 12 | 2 | 0 | Niklas | Bangsholt | 1996 | Nólsoy |
| 13 | 2 | 1 | Ari | Johannesen | 1996 | Toftir |
| 14 | 2 | 1 | Meinhard | Mikkelsen | 1996 | Glyvrar |
| 15 | 2 | 2 | Heðin | Gregersen | 1996 | Treysti |
| 16 | 2 | 14 | Høgni | Petersen | 1994 | Gøta |

**Gentur -13 f. 91-93 (2 km)**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 7 | 22 | Bjørk Herup | Olsen | 1991 | Bragdið |
| 2 | 8 | 14 | Rebekka | Fuglø | 1993 | Treysti |
| 3 | 8 | 15 | Vár | Gregersen | 1993 | Frælsi |
| 4 | 8 | 23 | Silja | Niclasen | 1993 | Frælsi |
| 5 | 8 | 41 | Kristianna | Jákupsdóttir | 1991 | Bragdið |
| 6 | 8 | 56 | Bjørg | Seloy | 1992 | Bragdið |
| 7 | 9 | 16 | Vilbjørg | Johannesen | 1992 | Treysti |
| 8 | 9 | 20 | Elspa Dahl | Hansen | 1992 | Roysnið |
| 9 | 9 | 28 | Rakul | Joensen | 1992 | Bragdið |
| 10 | 9 | 57 | Brynhild | Nielsen | 1991 | Roysnið |
| 11 | 10 | 4 | Ragnfríð | Hansen | 1993 | Toftir |
| 12 | 10 | 6 | Maria | Poulsen | 1992 | Bragdið |

**Dreingir -13 f. 91-93 (2 km)**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 6 | 43 | Remi | Langgaard | 1991 | Roysnið |
| 2 | 7 | 4 | Jan Elmar | Sørensen | 1991 | Treysti |
| 3 | 7 | 35 | Brian | Vang | 1991 | Hoyvík |
| 4 | 7 | 57 | Jimmy | Jønsson | 1991 | Roysnið |
| 5 | 8 | 1 | Øyvind | Lützen | 1993 | Bragdið |
| 6 | 8 | 8 | Rógvi | Egilstoft Nielsen | 1992 | Frælsi |
| 7 | 8 | 34 | Hákun | Hansen | 1992 | Bragdið |
| 8 | 8 | 57 | Janus | Gudmundsen | 1993 | Frælsi |
| 9 | 9 | 26 | Hjørtur | Búgvason | 1991 | Bragdið |
| 10 | 10 | 8 | Hanus Pál | Jógvansson | 1992 | Nólsoy |
| 11 | 10 | 11 | Beinir | Højgaard | 1993 | Saltangará |

**Gentur -17 f. 87-90 (2 km)**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 7 | 34 | Jenny | Svabo | 1990 | Frælsi |
| 2 | 7 | 40 | Marin | í Dali | 1989 | Bragdið |

**Dreingir -17 f. 87-90 (2 km)**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 6 | 23 | Jóan Karl | Joensen | 1987 | Bragdið |
| 2 | 6 | 41 | Robin | Jønsson | 1990 | Roysnið |
| 3 | 6 | 46 | Álvur F. | Christiansen | 1989 | Treysti |
| 4 | 6 | 58 | Daniel | Djurhuus Rein | 1990 | Bragdið |
| 5 | 7 | 1 | Pætur D. | Johannesen | 1988 | Kollafjørður |
| 6 | 7 | 49 | Amos | Delali | 1987 | Roysnið |
| 7 | 7 | 50 | Jan | Anthoniussen | 1988 | Saltangará |

**Kvinnur Veteranar f. -58 (10 km)**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 48 | 47 | Jóngerð | Høgnesen (KV) | 1948 | Bragdið |

**Menn f. 59-86 og Menn Veteranar (MV) f. -58 (10 km)**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 35 | 23 | Sam | Vang | 1970 | Bragdið |
| 2 | 35 | 29 | Jonhard | Larsen | 1966 | Treysti |
| 3 | 35 | 44 | Sigurð B. | Justinussen | 1967 | Bragdið |
| 4 | 35 | 48 | Cecil | Weihe | 1965 | Bragdið |
| 5 | 36 | 22 | Guttorm | Sørensen | 1968 | Treysti |
| 6 | 37 | 39 | Edgar | Caballero | 1982 | Roysnið |
| 7 | 37 | 42 | Trygvi | Hansen | 1966 | Bragdið |
| 8 | 37 | 55 | Jósvein Herup | Olsen (MV) | 1958 | Bragdið |
| 9 | 38 | 24 | Súni | Jacobsen | 1967 | Bragdið |
| 10 | 39 | 35 | Dorian | Petersen | 1968 | Bragdið |
| 11 | 40 | 38 | Jógvan Johan | Lorenzen | 1980 | Treysti |
| 12 | 40 | 39 | Henry | Olsen | 1964 | Tórshavn |
| 13 | 40 | 50 | Andrass | Joensen | 1963 | Bragdið |
| 14 | 41 | 8 | Hans Petur | Weihe | 1967 | Frælsi |
| 15 | 41 | 41 | Steindor | Hjaltalin (MV) | 1949 | Bragdið |
| 16 | 41 | 45 | Tummas | Joensen (MV) | 1956 | Treysti |
| 17 | 42 | 56 | Robert | Vilhelmsen (MV) | 1951 | Bragdið |
| 18 | 43 | 1 | Jákup-Alberg | Berg | 1963 | Bragdið |
| 19 | 43 | 11 | Flemming | Petersen | 1960 | Roysnið |
| 20 | 45 | 36 | Krisjan | Christiansen (MV) | 1952 | Bragdið |
| 21 | 45 | 43 | Harry | Hansen (MV) | 1938 | Roysnið |
| 22 | 46 | 33 | Jógvan | Olsen (MV) | 1956 | Bragdið |
| 23 | 46 | 44 | Gudmundur | Danielsen | 1982 | Glyvrar |
| 24 | 48 | 23 | Torry | í Bartalstovu | 1961 | Roysnið |
| 25 | 48 | 39 | Hans Birgir | Hansen (MV) | 1949 | Bragdið |
| 27 | 50 | 24 | Sølvi | Ragnarsson | 1978 | Frælsi |
| 28 | 52 | 58 | Regin | Jóanesarson (MV) | 1943 | Bragdið |

## EM-endaspælið í fótbólti

**Bólkur A**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Grikkaland | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 2 | Spania | 1 | 1 - 0 - 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 3 | Portugal | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 4 | Russland | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |

**Bólkur B**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Frakland | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 2 | Sveis | 1 | 0 - 1 - 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 3 | Kroatia | 1 | 0 - 1 - 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 4 | Ongland | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |

**Bólkur C**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Svøríki | 1 | 1 - 0 - 0 | 5 | 0 | 5 | 3 |
| 2 | Danmark | 1 | 0 - 1 - 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 3 | Italia | 1 | 0 - 1 - 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 4 | Bulgaria | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 5 | -5 | 0 |

**Bólkur D**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kekkia | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 2 | Týskland | 1 | 0 - 1 - 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 3 | Holland | 1 | 0 - 1 - 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 4 | Letland | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |

## Renna í Hvalvík

Leygardagin 19. juni verður skipað fyri rennikapping í Hvalvík í samband við stevnuna har.

Kappingin er samstundis partur av Grand Prix kappingini í renning hjá Frælsum Ítrótti Føroya.

**Bólkar og Skrá**
Kappast verður í ymsum bólkum hjá børnum og vaksnum. Byrjað verður sambært hesi skrá:

11.30 Avheintan av numrum á Kommunu-skrivstovuni
12.00 Gentur og dreingir -17 (f. 87-90) renna 2,572 km
12.05 Gentur og dreingir - 13 (f. 91-93) renna 2,572 km
12.10 Vaksin (f. 59-86) og veteranar (f. -58) renna 14,572 km
12.20 Gentur og dreingir - 10 (f. 94-96) renna 800 m
12.35 Gentur og dreigir -7 (f. 97-) renna 600 m

Startur og mál hjá øllum bólkum er við Kommunuskrivstovuna í Hvalvík, og fer tilmeldingin til kappingina fram á heimasíðuni, www.athletics.fo

## Lyngby tryggjað í 2. deild

Felagið hjá Christian Lamhauge Holst hevur bjargað sær lívinum í donsku 2. deild. Við einum 2-0 sigri á Næstved farna vikuskiftið komu teir leysir av niðurflytingarstrikuni, og nú eitt umfar er eftir at spæla, hava teir tryggjað sær luttøkuna í triðbestu donsku fótbóltsdeildini.

Christian Lamhauge Holst, sum hevur spælt á føroyska landsliðnum, skoraði annað av málunum hjá Lynbgy sunnudagin, og hann er toppskjútti hjá liðnum við 16 málum í hesum kappingarárinum.

## Völler var nøgdur

Týski landsliðssvenjarin Rudi Völler var væl nøgdur við innsatsin hjá sínum monnum í dystinum ímóti Hollandi, sum endaði við javnleiki 1-1. Týskland var á odda stóran part av dystinum, men móti endanum javnaði Holland.

– Tað var eitt sindur irriterandi, at teir javnaðu. Vit skulu havt økt til 2-0 frammanundan, men alíkavæl vil eg rósa mínum spælarum fyri dystin, segði Rudi Völler.

Týska liðið var væl skipað, vardi tætt og væl, og var ágangandi í skjótálopum fram eftir vøllinum. Holland hevði stórar trupulleikar við at finna holini í týsku verjuni, men í seinna hálvleiki gekk eitt sindur betur við tí, og endin var, at Ruud van Nistelrooy fekk sníkt ein bólt í týska málið.

## Eingin panikkur í Kekkia

Tað var um reppið, at letlendska landsliðið skapti eina nýggja sensatión, tá ið teir týsdagin høvdu kekkiska landsliðið á knøunum. Letland var á odda 1-0, til tað manglaðu 18 minuttir av dystinum. Tá javnaði Milan Baros, og fimm minuttir fyri tíð gjørdi Marek Heinz tað til 2-1 til Kekkia.

– Vit byrjaðu væl, men so mistu vit takið eina løtu í fyrra hálvleiki. Í seinna hálvleiki vóru vit munandi meira ágangandi, segði kekkiski landsliðsvenjarin Karel Brückner eftir dystin.

Sambært honum var eingin panikkur í kekkiska skiftirúminum í hálvleikssteðginum, hóast liðið var aftanfyri.

## Terry er til reiðar

Enski verjuspælarin John Terry, sum hevur verið plágaður av skaða, er nú aftur klárur at spæla, og tað verður roknað við, at hann byrjar á vøllinum í dystinum ímóti Sveis hódagin. John Terry spældi ikki ímóti Fraklandi, og hóast avloysarin hjá honum, Ledley King, spældi ein framúr góðan dyst, so má hann taka sess á beinkinum, tí Sven-Gøran Ericsson vil heldur hava John Terry at spæla.